Náttarravnar

1

Les tekstin

- Greið frá innihaldinum
- Sig tína hugsan um tiltakið

Náttarravnar gera seg klárar

Náttarlív: – Vit fara í næstum at kalla til borgarafund og kunna um ætlanirnar við Náttarravnum, sigur Carl A. Arge, ein av stigtakarunum til Náttarravnarnar. Hetta er ein felagsskapur fyri borgarar, sum bjóða seg fram at halda eitt vakið eyga við ungdóminum á náttartíð.

Harðskapur er eitt kent fyribrigdi í náttarlívinum, og í seinastuni hava fleiri dømi verið um sera álvarsligan harðskap, har eisini knívur er brúktur. Hetta hevur fingið foreldur og onnur úr dvala, og tey vilja nú ganga saman í eina verkætlan, Náttarravnarnar, sum er eitt kent fyribrigdi í grannalondunum.

– Endamálið er at fáa ábyrgdarfull fólk at ferðast í umhvørvinum, har tey ungu plaga at stuttleika sær. Talan er ikki um nakað vaktarhald ella nakað politilíknandi virksemi. Vit skulu bara vera á gøtunum, har tey ungu ferðast. Vit skulu ikki blanda okkum í nakað, men bert halda eitt vakið eyga við, tí sum fyriferst, sigur Carl A. Arge, ein av stigtakarunum til Náttarravnarnar.

Tað er ikki av tilvild, at hetta navnið er valt. Í hinum Norðurlondunum eru Náttaravnar ein partur av gøtumyndini nógvastaðni. Í Danmark eru 73 býir, sum hava skipað fyri Náttarravnum, og í Grønlandi eru fýra býir. Samanlagt í Norðurlondunum er talan um fleiri hundrað býir.

Sum høvuðsstuðul hjá Náttarravnum í Norðurlondum hevur tryggingarfelagið Skandia bjóðað sær til at ráðgeva og gera greiðar reglugerðir á økinum, sum foreldrini skulu fylgja. M.a. sigur reglugerðin, at tað ongantíð mugu vera færri enn trý vaksin saman, at bæði kynini skulu vera umboðað, og at tey skulu hava fingið vegleiðing í, hvussu ein tosar við ung, og hvussu t.d. fyrstahjálp verður veitt.

Ráðgevar hjá Skandia hava bjóðað sær at koma til Føroya at vegleiða og lata jakkar við føroyskari áskrift.

Tað hevur stóran týdning, at sosialu myndugleikarnir vísa okkum vælvild, og so hevur eisini verið. Vit hava tosað við løgregluna og vilja hava gott samstarv tann vegin. Borgarstjórin hevur lovað at verið við á borgarafundinum, sum vit ætla at skipa fyri skjótast til ber, har vit greiða frá ætlanunum. Tað er týdningarmikið, at borgararnir í kommununi eisini vísa hesum tiltaki áhuga. Tað nýtast ikki bara at vera foreldur at børnum, sum ganga í býnum, sum vera við, men eisini onnur áhugað, sigur Carl A. Arge.

(Grein úr Dimmalætting 25. oktober 2001)

Narkoátak

2

Les tekstin

- Greið í stuttum frá innihaldinum
- Sig tína hugsan um misnýtslu hjá ungfólki í Føroyum

Størsta narkoátak í Føroya søgu:

Níggju menn tiknir

Løgreglan í Føroyum framdi í gjár tað størsta átakið móti narkotikasmugling nakrantíð. Níggju menn vórðu handtiknir í Føroyum, og ein varð tikin í Danmark. Løgreglan heldur seg hava fingið fatur á teimum týdningarmestu bakmonnunum, ið standa fyri innflutningi av ólógligum rúsandi evnum til Føroya.

- Vit hava illgruna um, at teir handtiknu standa fyri størsta partinum av innflutninginum av rúsandi evnum til Føroya, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini.

Á middegi í gjár framdi løgreglan í Føroyum tað størsta átakið móti narkotikasmugling nakrantíð. Einir 40 løgreglumenn vóru við í átakinum.

Løgreglan gjørdi níggju húsarannsóknir í bústøðunum hjá teimum níggju monnunum, ið eru millum 25 og 43 ára gamlir. Átta av monnunum búgva í Havn, men ein varð tikin í Klaksvík.

Allar rannsóknirnar vórðu framdar samstundis. Løgreglan hevur framt átakið í samstarvi við narkodeildina hjá løgregluni í Keypmannahavn, har ein maður varð tikin. Hann er fyribils varðhaldsfongslaður í trettan dagar. Óvist er, hvussu leingi hinir verða varðhaldsfongslaðir.

Undir húsarannsóknunum eru húsini hjá teimum skuldsettu endavend, og løgreglan hevur leitað eftir prótvilfari. Eisini varð leitað á ávísum arbeiðsplássum, har sum menninir arbeiða.

Níggju menn frá donsku løgregluni, sum dagliga arbeiða á rannsóknarliðnum, vóru við í húsarannsóknunum. Løgreglan í Havn hevði ikki nóg mikið av fólki og mátti tí fáa hjálp úr Danmark.

Fimm av monnunum vóru til grundlógaravhoyring í Føroya Rætti fyrrapartin hósdagin. Teir eru 27 til 35 ára gamlir. Hinir fýra, sum eru 25 til 43 ár, verða leyslatnir fyri fyrst, men teir eru skuldsettir og kunnu vænta at verða ákærdir seinni.

Grundlógaravhoyringin fór fram fyri afturlatnum hurðum, og tí ber ikki til at fáa so nógv at vita um úrslitið av avhoyringini enn.

Høvuðsmenn

Løgreglan heldur seg hava tikið høvuðsmenninar, ið skipa fyri at smugla og selja sterk, rúsandi evni í Føroyum. Talan er um hassj, kokain, amfetamin og nú eisini ekstasy.

Menninir eru skuldsettir fyri at hava skipað fyri at smugla og selja stórar nøgdir av rúsandi evnum í langa tíð.

Bergleif Brimvík sigur, at løgreglan hevur gjørt umfatandi kanningar í Føroyum, har hon hevur sett fólk burturav at taka sær av hesum málinum. Seinastu tíðina er størri orka nýttog fleiri fólk eru sett av til kanningararbeiðið.

(Sosialurin 18. januar 2002)

3

11. september 2001

Les tekstin

- Greið frá hendingini við støði í tekstinum
- Skriva um, hvat tú heldur kann liggja aftan fyri slíka gerð

USA brennur

Yvirgangur: USA er skelkað, eftir at tvey flogfør hava rent á World Trade Center í New York, og eitt annað flogfar er dottið niður í Pentagon.

Amerikanarar fingu ein stóran skelk týsdagin, tá tvey flogfør rendu á World Trade Center í New York, og eitt triðja flogfar sprongdist í Pentagon í Washington, sum er bygningurin hjá amerikanska verjumálaráðnum.

Amerikanskar sjónvarpsstøðir søgdu, at annað flogfarið, sum rendi á World Trade Center, var eitt ferðamannaflogfar hjá American Airlines. Tað var av slagnum Boeing 767 og varð rænt á veg úr Boston til Los Angeles.

Stutt eftir brestirnar í World Trade Center komu boðini um, at eitt flogfar hevði rent á Pentagon. Tey 20.000 starvsfólkini í bygninginum vórðu alt fyri eitt flutt burtur. Eisini í Hvítu Húsunum og á virðisbrævamarknaðinum í Wall Street var manntómt eftir spreingingarnar.



Amerikanski forsetin, George W. Bush, segði í síni fyrstu viðmerking, at talan var um skipaðan yvirgang ímóti USA. Hann lovaði, at teir seku fóru at verða revsaðir. Stutt eftir átók ein palestinskur felagsskapur sær ábyrgdina av álopunum.

Bæði tornini á World Trade Center rapaðu, og roykur og logar stóðu upp úr bygningunum eftir álopini. Sjónarváttar søgdu, at teir sóu fólk leypa út í gjøgnum vindeyguni.

Sambært Reuter skuldu 158 ferðafólk vera við flogfarinum hjá American Airlines. Men flogfelagið visti ikki at siga, um øll hesi fólkini vóru umborð, tá flogfarið rendi á. Ein sjónarvátti í Washington segði, at flogfarið, sum rendi á Pentagon, eisini var eitt ferðamannaflogfar.

George W. Bush var ikki staddur í Hvítu Húsunum, tá ið álopini vórðu framd. Hann var á arbeiðsferð í Florida, men skundaði sær aftur til Washington, tá ið hann frætti um álopini.

Blaðstjórin á einum arábiskum blað, sum verður givið út í London, segði seg ikki ivast í, at saudiarábiski yvirgangsmaðurin, Osama bin Laden, hevur ábyrgdina av álopunum.

(Grein úr Dimmalætting 11. september 2001)

2 Prutl og koyrikort

Les tekstin

- Ger tínar viðmerkingar til tekstin
- Hvat heldur tú um tilmælið frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd?
- Kom við tínum egna tilmæli, kanska tað vinnur frama, øll skilagóð hugskot eru vælkomin

Prutl, motorsúkklur og koyrikort

Hóast tann vanliga súkklan ikki verður serliga nógv nýtt í Føroyum longur, so er øðrvísi vorðið, tá talan er um prutl og motorsúkklur, sum serliga hesi seinastu árini eru vorðin nógv fleiri í tali.

Tey, sum koyra prutl og motorsúkklur, hava, sum kunnugt, nógv størri sannlíkindi at verða skadd í ferðsluni enn tey, sum koyra í bilum og bussum, tí fólk á prutli og motorsúkklum eru nógv verri vard enn hini.

Prutl

Tað eru, sum vera man, serliga ungdómar, sum koyra á prutli, og hóast kravt er 16 ára aldursmark at koyra hetta akfarið, so er eingin ivi um, at tað eru rættiliga nógv, sum als ikki eru komin til hetta lógarásetta aldursmarkið, sum longu koyra á prutli í ferðsluni. Harafturímóti verður ikki kravt, at viðkomandi hevur fingið eina skipaða undirvísing, áðrenn formligt koyriloyvið frá myndugleikunum verður latið.

Lítið prutl

Sum kunnugt er støddin á prutlum nú eisini ymisk. Tað eru „smá prutl", sum ikki kunnu koyra skjótari enn 30 km/t.

Stórt prutl

Nú eru eisini „stór prutl", sum kunnu koyra 45 km/t, í ferðsluni.

Lítil og stór motorsúkkla

Eins og munur er á prutlum, so er eisini munur á motorsúkklum, hildið verður tí eisini skilagott at skilgreina markið millum smáar og stórar motorsúkklur.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur hetta <u>tilmælið:</u>

- at loyvt skal verða 15 ára gomlum at fáa koyrikort til prutl,
- at ein skipað koyrifrálæra, ið bæði skal fevna um tann ástøðiliga (teoretiska) og verkliga partin (at læra at koyra), verður lokin, og
- at koyrifrálæruprógv frá koyrilærara verður latið eftir nøktandi koyriroynd,
- at 16 ára gomul kunnu fáa koyrikort til stór prutl,
- at ein skipað víðkað koyrifrálæra, ið bæði skal verða ástøðilig og verklig, verður lokin
- at koyrifrálæruprógv frá Akstovuni (Bileftirlitinum) verður latið eftir nøktandi koyriroynd, og
- at áseta aldursmarkið at fáa koyrikort til smáar og stórar motorsúkklur til ávikavíst 18 og 21 ár.

(Úr: Ávegis til nullhugsjónina – Ráðið fyri Ferðslutrygd 2003)

4. Landslag og sjálvsmynd

- Greina og tulka málningin

Yvirskrift: Landslag og sjálvsmynd



Málningur eftir Ruth Smith: Landslag og sjálvsmynd, oljumálningur, 61,5x52, 1957

5 Skrivifrælsi, talufrælsi, trúarfrælsi

- Skriva um evnið